# Skeiðslýsing

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar** | 8996.16 |
| **Heiti** | Klinisk vegleiðaraútbúgving |
| **ECTS** | 10 |
| **Fortreytir** | Miðallong heilsufaklig útbúgving. |
| **Stig** | Bachelor |
| **Endamál** | Ætlanin við skeiðinum er, at lesandi mennir sín førleika at fyriskipa, vegleiða, undirvísa og próvdøma/meta í klinisku undirvísingini í heilsuútbúgvingunum. |
| **Innihald** | Innihaldið í undirvísingini er:<br>• Læruástøði og lærutilgongdir<br>• Læruumhvørvi við denti á lærurúm<br>• Læruhættir, vegleiðing og vegleiðaraleiklutur<br>• Refleksjón<br>• Eftirmeting og døming |
| **Læru- og undirvísingarhættir** | Undirvísingin er skipað við skifti millum fyrilestrar, dialog, lesibólkar, bólkaarbeiði og sjálvlestur. |
| **Læruúrtøka** | Eftir lokið skeið, skal lesandi:<br>• Greiða frá meginhugtøkunum innan námsfrøði við atliti at kliniskari vegleiðing og undirvísing<br>• Leita fram, velja og meta granskingargrundaða vitanum námsfrøði og didaktik, sum viðvíkur kliniska útbúgving í heilsufakum<br>• Greiða frá vísindaástøðiliga grundarlagi í mun til útvald námsfrøðilig ástøði og háttaløg<br>• Menna, leggja til rættis, fremja og eftirmeta kliniska vegleiðing og undirvísing við støði í luttakarafortreytum og týdninginum, sum læruumhvørvið hevur fyri lærutilgongdir<br>• Reflektera um og menna egnu vegleiðing |

| | |
|---|---|
| | • Eftirmeta og døma í mun til útbúgvingarstig, læruúrtøku, galdandi lóg, kunngerðir og reglur. |
| **Próvtøkuháttur** | Skrivlig uppgáva |
| **Próvdøming** | Innanhýsis |
| **Próvtalastigi** | Staðið/ikki staðið |
| **Lestrarlisti** | Sí undirvísingarskrá |
| **Ábyrgd** | Súsanna Herdalur Tausen |